tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 19.12.2024 kl. 13:00 |
| **Málnr.:** | 20/00367 |
| Nevndarlimir: | Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Onnur: | |
| Nevndarskrivari: | Fróði Mortensen |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 82/24 | 24/00367-4 | Bátur til tilbúgvingina |
| 83/24 | 24/00314-2 | Bilur til umsitingina |
| 84/24 | 24/00261-3 | Sjógøta 2. -Útskifting av gomlum oljufýri til jarðhita - nýggj orkuloysn til upphiting í Posta bygninginum - Tværoyrar kommuna og Føroya Banki |
| 85/24 | 24/00349-1 | FÆ2024 -Eykajáttanir flytingar millum íløgur og rakstrarstøð |
| 86/24 | 24/00120-2 | Mýrifípan -Barnaansingin í summarfrí, skriv frá leiðsluni á Suðuroyar Sjúkrahús 2024 |
| 87/24 | 24/00234-1 | Eldrafimleikur á SER |
| 88/24 | 24/00368-2 | Kommunufelagið hoyring: uppskot til løgtingslóg um tænastugjøld á tóm býli |
| **Til kunningar** | | |
| 28/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| 29/24 | 24/00364-1 | Lokalsamfeløg í útnorðri -Seinna frágreiðingin, sum er sprottin úr verkætlanini NorValue Sustainable value chains in Nordic coastal communities, 2021-2024 |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin og spyr um viðmerkingar eru til skránna –Ongin viðmerking.

Til støðutakan

## 82/24
## 24/00367-4 Bátur til tilbúgvingina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin) | 16.12.2024 | 1/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.12.2024 | 82/24 |
| 3 Býráðið | 19.12.2024 | 82/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.12.2024**
Átaksleiðarin hevur í eina tíð víst á tørvin at Tilbúgvingin ognar sær ein bát, ið er staðsetur á Tvøroyri, sum kann brúkast til bjargin.  Víst hevur verði á tørv á einum báti sum er skjóttgangandi og sum kann sjósetast skjótt og lætt.

Eysturkommuna hevur ein líknandi bát til sølu, sum Átaksleiðarin metur lúkar krøvini, og hevur heitt á umsitingin um at kann hvørt til ber at bjóða uppá henda bátin.

Tvøroyrar kommuna bjóðaði uppá bátin hin 10. desember og 2 dagar seinni fær kommunan boð um, at Eysturkommuna hevur góðkent boði hjá Tvøroyrar kommunu.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Keypsprísurin er kr. 175.000,- játtanin verður av FÆ2024, §715 "Bygging og løguframl. Til sløkkiliði", har játta er kr. 125.000,- til keyp av báti. Neyðugt er við eyka játtan á kr. 50.000,-

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið tilbúgvingarnevndini, fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin) 16. december 2024:**
Tilbúgvingarnevndin tekur einmælt undir við at keypa bátin, ið verður staðsetur á Tvøroyri, og sum verður at innganga í felags tilbúgvingina hjá Fámjins-, Hvalbiar og Tvøroyrar kommunu. -Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. december 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá Tilbúgvingarnevndini um at keypa bátin, ið Eysturkommuna hevur lýst til sølu, og at báturin verður at innganga í felags tilbúgvingina hjá Fámjins-, Hvalbiar og Tvøroyrar kommunu.

**Býráðið 19. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tilbúgvingarnevndin og fíggjarnevndini, at keypa bátin sum Eystur kommunu hevur sett til sølu. Báturin verður fíggjaður av §715. Málið verður skal hava tvinnar viðgerðir við tað, at talan er um eykajáttan á kr. 50.000,-.

**83/24**
**24/00314-2 Bilur til umsitingina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 69/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 75/24 |
| 3 Býráðið | 06.12.2024 | 81/24 |
| 4 Býráðið | 19.12.2024 | 83/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.10.2024**
Mælt verður til at kommunan eigur ein bil til starvsfólkini í umsitingini at brúka. Sum støðan er nú, koyra starvsfólk í egnum bili, tá tey skulu røkja arbeiðsuppgávur, kring um í kommununi, eitt nú tá hesi skulu á fundir við aðrar kommunur og stovnar.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Onki avsett á FÆ2024, mælt til at fíggja keypið av §115 íløgujáttan til býráðsskrivstovu. Avsett eru kr. 700.000,- onki er brúkt d.d.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Heitt verður á umsitingina um at innheinta fleiri tilboð. Málið verður útseta til ein seinni fund í fíggjarnevndin.

**Kommunustjórin 26.11.2024:**
Kommunustjórin hevur samskift við seljara, ið hevur ein brúktan bil til sølu fyri kr. 150.000,-, ið lúkar tørvin hjá umsitingini. Mælt verður til til at fíggja keypið av §115 íløgujáttan til býráðsskrivstovu.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Einmælt samtykt at umsitingin útvegar ein arbeiðsbil samsv. uppskot hjá kommunustjóranum 26.11.2024, ið verður fíggja av §115 íløgujáttan til býráðsskrivstovu.

**Kommunustjórin 02.12.2024:**
Bilurin, sum kommunustjórin hevði samskift við seljara um er seldur. Tað er ikki lætt at finna ein hóskandi bil, ið stødd og tørvsmeting fyri minni upphædd enn kr. 250.000,-.

**Býráðið 06. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá kommunustjóranum, og játta arbeiðsbil fyri kr. 250.000,- -málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 19. december 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**84/24**

**24/00261-3 Sjógøta 2. -Útskifting av gomlum oljufýri til jarðhita - nýggj orkuloysn til upphiting í Posta bygninginum - Tvøroyrar kommuna og Føroya Banki**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 70/24 |
| 2 Býráðið | 06.12.2024 | 75/24 |
| 3 Býráðið | 19.12.2024 | 84/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.11.2024**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá Føroya Banka, at skifta oljufýr og ketil í felags bygninginum á Sjógøtu 2,. við varandi orkuskipan grøna orkuskipan.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** PBC ráðgevi, hevur meting um eina sparing á uml. kr. 61 tús./ár, u/MVG, við verandi olju- og elprísum, um skift verður frá oljukyndum ketli til el-rikna jarðhitapumpu. Íløgu kostnaðurin fyri Tvøroyrar kommunu verður áleið kr. 600 tkr.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Einmælt samtykt at skifta oljufýr og ketil í felags bygninginum á Sjógøtu 2, við varandi orkuskipan grøna orkuskipan, sum verður fíggja av FÆ2024 §609 íløga til, og írestandi við eykajáttan av innistandandi. Málið verður beint í býráðið og skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 06. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini og umsitingini at skifta oljufýr og ketil í felags bygninginum á Sjógøtu 2, við varandi grøna orkuskipan, sum verður fíggja av FÆ2024 §609 íløga til, og írestandi við eykajáttan av innistandandi. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 19. december 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**85/24**
**24/00349-1 FÆ2024 -Eykajáttanir flytingar millum íløgur og rakstrarstøð**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.11.2024 | 79/24 |
| 2 Býráðið | 06.12.2024 | 80/24 |
| 3 Býráðið | 19.12.2024 | 85/24 |

**Málslýsing: Kommunustjorin 26.11.2024**
Fíggjardeildin hevur pr. 26. nov. 2024 gjørt upp yvirlit yvir játtanir FÆ2024 og realisera kostnað á rakstrarstøðum. Avgjørt hevur verði at fremja umraðfestingar í avsetingunum til løgur og rakstur og er tí neyðugt við flytan av játtan á rakstrarstøðum. Neyðugt hevur verði við hægri rakstrarjáttan á einkultum rakstrarstøðum, eins og minni nýtsla hevur verði á summum rakstrarstøðum.

Eykajáttanirnar eru metingar hjá fíggjarleiðara og kommunustjóra og eru grundaðar á fyriliggjandi uppgerð, og verða allar umraðfestingar játtaðar innan fyri sama rakstarstað.

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til, at fíggja eykajáttan innan fyri verandi fíggjarkarm við flytingum av játtanum innan hvørja grein sær, samsvarandi niðanfyri yvirlit *"Eykajáttanir 2024"*. -Málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
FÆ2024 -flytan millum íløgu og rakstarjáttanir

**Tilmælið:**
Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til at veita eykajáttan og regulering av FÆ2024, samsv. niðanfyri:

| **Flutt verður frá niðanfyri rakstrar- og íløgustaði** | | | |
|---|---|---|---|
| **Konto** | **Kontoheiti** | **Slag** | **Upphædd** |
| 115 | Fyrisiting | Løgur | -500.000 |
| 122 | Kunningarstovan | Rakstur | -150.000 |
| 310 | Barnagarður | Rakstur | -900.000 |
| 609 | Bygningar | Løgur | -1.000.000 |
| 615 | Bygging | Løgur | -500.000 |
| 632 | Viðalundir | Rakstur | -240.000 |
| 633 | Viðalundir | Løgur | -450.000 |
| 635 | Bygging | Løgur | -180.000 |
| 619 | Kirkjugarð | Løgur | -1.875.000 |
| 630 | Umhvørvistiltøk | Rakstur | -75.000 |
| 620 | Vatn | Rakstur | -200.000 |
| 621 | Vatn | Løgur | -550.000 |
| 623 | Kloakk | Løgur | -2.800.000 |
| | | | **-9.420.000** |

**Flutt verður til niðanfyri rakstrar- og íløgustøð:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 126 | Kommunustýrislimir | Rakstur | 350.000 |
| 112 | Val | Rakstur | 125.000 |
| 114 | Fyrisitingin | Rakstur | 450.000 |
| 210 | Kommunulæknar | Rakstur | 50.000 |
| 214 | Tannrøkt | Rakstur | 250.000 |
| 215 | Tannrøkt | Løgur | 250.000 |
| 218 | Barnavernd | Rakstur | 150.000 |
| 311 | Barnagarður | Løga | 1.200.000 |
| 312 | Frítíðarskúlin | Rakstur | 300.000 |
| 300 | Ung í arbeiði | Rakstur | 120.000 |
| 317 | Spælipláss | Løga | 685.000 |
| 414 | Forskúlin | Rakstur | 80.000 |
| 524 | Virðiskort | Rakstur | 30.000 |
| 525 | FSR | Løga | 1.550.000 |
| 526 | Bókasavn | Rakstur | 25.000 |
| 530 | Svimjihøll | Rakstur | 10.000 |
| 532 | Ítróttarhøllin | Rakstur | 100.000 |
| 614 | Fríðkan | Rakstur | 250.000 |
| 616 | Hegn og bøgarðar | Rakstur | 20.000 |
| 714 | Sløkkiliðið | Rakstur | 575.000 |
| 718 | Tvøroyrar Havn | Rakstur | 850.000 |
| 810 | Rentustuðul | Rakstur | 800.000 |
| 820 | Rentur | Rakstur | 1.200.000 |
| | | | **9.420.000** |

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 28. november 2024:**
Einmælt samtykt at veita eykajáttan og reguleringar á FÆ2024, samsv. omanfyri tilmælið hjá fíggjarleiðaranum og kommunustjóranum. Málið verður beint í býráðið og skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 06. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini at veita eykajáttan og reguleringar á FÆ2024, samsv. tilmælið hjá fíggjarleiðaranum og kommunustjóranum. -Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 19. december 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**86/24**
**24/00120-2 Mýrifípan -Barnaansingin í summarfrí**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 22.04.2024 | 10/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 23/24 |
| 3 Sosiala nevnd | 12.09.2024 | 21/24 |
| 4 Sosiala nevnd | 17.10.2024 | 27/24 |
| 5 Sosiala nevnd | 11.12.2024 | 29/24 |
| 6 Býráðið | 19.12.2024 | 86/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19. Apríl 2024**
Forkv. í Sosialu nevnd ynskir viðgerð av áheitan hjá stjóranum á Suðuroyar Sjúkrahús, um at endurskoða ætlanina um at lata barnaansingina aftur.

Stjórin á Suðuroyar Sjúkrahúsið skrivar 18. Apríl til forkv. í SN og til umsitingina.

> *Suðuroyar Sjúkrahús hevur frætt, at flestu kommunurnar í oynni stongja barnaansingarøkið í eitt tíðarskeið í summar. Hetta kemur sera dátt við hjá sjúkrahúsinum, sum orsakað av hesum hevur sera trupult við at fáa starvsfólk/foreldur til arbeiðis hetta tíðarskeiðið.*
>
> *Suðuroyar Sjúkrahús er eitt akuttsjúkrahús við funktiónum bæði innan medisin og kirurgi. Sjúkrahúsið er opið alt samdøgrið og allar dagar í árinum. Vit hava tørv á nógvum starvsfólkum, sum arbeiða ólagaligar arbeiðstíðir og eisini, tá onnur fólk hava feriu. Tá talan er um eina so týðandi funktión sum eitt akutsjúkrahús, so er ikki møguligt at tillaga virksemið eftir árstíð, feriu ella halgidøgum, men neyðugt er altíð at hava somu akuttu tilbúgving og tænastu.*
>
> *Tá flestu kommunur í Suðuroynni velja at lata barnaansingarøkið aftur í eitt tíðarskeið í summar, er tað sera trupult hjá sjúkrahúsinum at fáa mannað vaktir hetta tíðarskeiðið, barnaansingarøkið er stongt. Hetta tí, at nógv av starvsfólkunum eru foreldur at børnum, sum nýta gott av hesum vælferðartænastum, og verða foreldrini nú noydd at halda feriu samstundis, sum barnaansingin er stongd.*
>
> *Barnaansingin er ein týðandi liður í, at foreldur og starvsfólk sleppa til arbeiðis, og er harvið við til at tryggja, at ein vælfarðartænasta sum sjúkrahúsið kann fungera.*
>
> *Vit vilja við hesum skrivið vísa á trupulleikan á økinum nú barnaansingin stongir í summarferiuni, og vóna at málið kann takast upp til nýggja viðgerð.*
>
> *Hetta brævið er sent øllum kommununum í Suðuroynni.*
> *Við vón um vælvild., Vinaliga, Hanus Toftheygg, sjúkrahússtjóri*

***Tilmælið:*** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan

**Sosiala nevnd 22. april 2024:**
Mælt verður til at halda fast við býráðssamtyktina frá 11. mars 2024. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir til, at býráðið samtykkir tilmælið hjá sosialu nevnd, og at málið verður tikið upptil nýggja viðgerð í sosialu nevnd til komandi summar.-
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech
Ímóti: Bjarni Hammer, Kristina Roest, Jens Arni Hammerfoss Leo
Tilmælið hjá sosialunevnd er harvið samtykt

**Sosiala nevnd 12. september 2024:**
Heitt verður á umsitingina um at fáa eina eftirmeting av støðuni, nú barnaansingin var stongd í 3 viku í farna summar. Málið verður tikið upp á næsta fundi. -heitt verður eisini á umsitingina um at orða viðtøkur fyri virksemið ráðsins.

**Sosiala nevnd 17. oktober 2024:**
Nevndin er kunna um tilmælið hjá leiðaranum og starvsfólkum frá 20. sep., ið mæla til at stongja barnaansingina í komandi summar, í vikunum 29, 30, 31 *(14. juli til 3. august 2025).* Sosiala nevnd mælir til at útseta málið, til foreldraráði hevur viðgjørt málið.

**Sosiala nevnd 11. december 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til at stongja barnaansingina í komandi summar, í vikunum 29, 30, 31 (14. juli til 3. august 2025), og at hetta verður kunna skjótast gjørligt. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 19. december 2024:**
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Sosialu nevnd at stongja barnaansingina um sumrarnar.
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech og Eyð Eidesgaard
**Ímóti eru:** Bjarni Hammer, Kristina Roest
Harvið er tilmælið hjá sosialu nevnd samtykt at stongja barnaansingina 3 vikur í komandi summar 2025, vikurnar 29, 30 og 31*(14. juli til 3. august 2025)*.

**87/24**
**24/00234-1 Eldrafimleikur á SER**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.09.2024 | 23/24 |
| 2 Sosiala nevnd | 11.12.2024 | 30/24 |
| 3 Býráðið | 19.12.2024 | 87/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 10.09.2024**
Forkv. í sosialu nevnd ynsir at viðgerða eldrafimleik á SER

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. september 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til, at umsitingin heitur á BHS um at tænastan *«Møguleiki er hjá borgarum í Suðuroy 65+ at fáa fyribyrgjandi viðlíkahaldsvenjingar»* verður veitt ájavnt á sama støði í norðari hálvu, sum verður veitt á Hamragarði. At úitbúnaðurin, ið verður nýttur til venjingar er á sama støði og at hesin verður dagførdur, og at títtleikin til venjingar er eins.

**Sosiala nevnd 11. december 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til at BHS veitur javnbjóðis tænastur í norðaru hálvu í Suðuroynni til *borgarar 65+, har hesir fáa fyribyrgjandi viðlíkahaldsvenjingar»* sum í sunnaru hálvu. Og at úitbúnaðurin, ið verður nýttur til venjingar er á sama støði og at hesin verður dagførdur, og at títtleikin til venjingar er eins. -málið verður beint í býráðið

**Býráðið 19. december 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd, um at heita á BHS at veita javnbjóðis tænastur í norðaru hálvu í Suðuroynni til borgarar 65+, har hesir borgarar fáa fyribyrgjandi viðlíkahaldsvenjingar» eins og í sunnaru hálvu. Og at útbúnaðurin, ið verður nýttur til venjingar er á sama støði, og at útbúnaðurin verður dagførdur, og at títtleikin til venjingar er eins í norðari hálvu, sum í sunnari hálvu.

**88/24**
**24/00368-2 Kommunufelagið hoyring: uppskot til løgtingslóg um tænastugjøld á tóm býli**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.12.2024 | 83/24 |
| 2 Býráðið | 19.12.2024 | 88/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.12.2024**
Kommunufelagið hevur sent Tvøroyrar kommunu hoyring: Uppskot til løgtingslóg um tænastugjøld á tóm býli

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 19. december 2024:**
Fíggjarnevndin mælir til at áseta orðingarnar:
§1, stk. 4. *«Um ein kommuna nýtir heimildina at krevja tænastugjald fyri býli, har eingin er skrásettur at búgva, skal kommunan krevja tænastugjald fyri øll býli í kommununi, har eingin er skrásettur at búgva í býlinum.” “***Verður broytt til kann”**

§2, stk. 4 . *«Tænastugjaldið í 2026 má í mesta lagi vera xxx kr. fyri hvønn mánað” “* **Kommunan skal sjálv hava heimild at áseta hvat gjaldið kann verða”**

Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 19. december 2024:**
Anita Vibergsdóttir mælir til at fylgja orðingina í lógini uttan viðmerking.
Atkvøtt verður um tilmælið hjá Anitu Vibergsdóttir.
**Fyri eru:** Anita Vibergsdóttir og Jónleyg Jespersen Bech
**Ímóti er**: Bjarni Hammer, Kristina Roest
**Blankt:** Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard.
**Uppskotið fallið**

Atkvøtt verður um tilmælið hjá fíggjarnevndini §1, stk 4.
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard, Bjarni Hammer og Kristina Roest
**Ímóti eru:** Anita Vibergsdóttir, Jónleyg Jespersen Bech
**Uppskotið er samtykt**

Atkvøtt verður um tilmælið hjá fíggjarnevndini §2, stk 4.
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Eyð Eidesgaard, Bjarni Hammer og Kristina Roest
**Ímóti eru:** Anita Vibergsdóttir
**Blankt:** Jónley J. Bech
**Uppskotið er samtykt**

**Til kunningar**

## 28/24
## 24/00004-1 Skattatøl 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 8/24 |
| 6 Býráðið | 06.05.2024 | 13/24 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 9/24 |
| 8 Býráðið | 06.06.2024 | 14/24 |
| 9 Býráðið | 17.07.2024 | 18/24 |
| 10 Býráðið | 26.09.2024 | 21/24 |
| 11 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 13/24 |
| 12 Býráðið | 07.11.2024 | 23/24 |
| 13 Býráðið | 06.12.2024 | 25/24 |
| 14 Býráðið | 19.12.2024 | 28/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 26. september 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 07. november 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 06. december 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 19. december 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**29/24**
**24/00364-1 Lokalsamfeløg í útnorðri -Seinna frágreiðingin, sum er sprottin úr verkætlanini NorValue Sustainable value chains in Nordic coastal communities, 2021-2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 19.12.2024 | 29/24 |

**Býráðið 19. december 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 14:05

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Jóna Eidesgaard